Skúlaspírin

Forskúlin í Eysturkommunu

Um Skúlaspíran

Skúlaspírin, sum er forskúlin í Eysturkommunu, var fyrsti kommunali forskúli í Føroyum eftir nýggju fólkaskúlalógini. Endamálið og visiónin fyri forskúlan er “Við leiki og læru gerst barnið skúlabúgvið.” Ein góð skúlagongd ger sítt til, at børnini verða før fyri at skapa sær eitt gott lív.

Skúlaspírin er eisini stovnaður fyri at byggja brúgv ímillum dagstovnaøkið og fólkaskúlan. Í Skúlaspíranum fáa øll børn í Eysturkommunu eina bleyta og væl fyrireikaða byrjan uppá skúlagongdina, tey skulu ígjøgnum tey næstu 9 árini. Námsfrøðingar og lærarar starvast lið um lið og á jøvnum føti í Skúlaspíranum, barninum at frama.

Ein góð byrjan

Øll vita, at grundin er tað, sum hevur størstan týdning fyri, hvussu samlaða úrslitið verður. Í Skúlaspíranum hava vit møguleikar at byggja eitt gott grundarlag fyri allar næmingar. Her eru umstøður og stundir til at skapa fortreytir fyri, at allir næmingar fáa eina góða byrjan - eina byrjan, sum ger, at teir fara at trívast í skúlanum og menna hugin at læra.

Arbeitt verður við grundarlagnum fyri góðari skúlabyrjan, og børnini læra tey mest grundleggjandi hugtøkini aftan fyri fak sum mál og støddfrøði í bæði leiki og læru.

Fyrstu dagarnar, inntil barnið kennir seg trygt og væl í Skúlaspíranum, eru foreldur vælkomin at vera í skúlanum eina løtu. Um tað vísir seg, at barnið ikki hevur tað so gott, seta vit okkum í samband við foreldrini fyri at finna út av, hvat best er at

gera, so barnið aftur kann fáa tað gott í skúlanum. Samstarvið millum skúla og heim er lykilin til at skapa bestu umstøður fyri trivnaði og menning hjá barninum.

Skúladagurin

Skúlaspírin er frá kl. 8.00 -11.20 vanligar skúladagar. Eftir hetta kunnu børnini fara í Frítíðarheimið, har tey spæla og hugna sær víðari saman við sínum javnaldrum.

Børnini eiga at møta í skúla hvønn dag kl. 8.00. Foreldur kunnu tó velja at hava barnið heima ein dag ella tveir, um okkurt serligt er. Foreldur eiga altíð at boða skúlanum frá, um og hví barnið ikki kemur í skúla.

Hvørji børn eiga at koma í Skúlaspíran?

Skúlaspírin er tilboð til børn í Eysturkommunu, sum fylla 6 ár tað árið, tey byrja. Tó kunnu vera umstøður, sum gera, at tað er betri fyri barnið at bíða eitt ár. Foreldur, sum eru í iva um, hvat er best fyri teirra barn, kunnu tosa við námsfrøðingarnar, sum eru um barnið á stovninum, við okkum í skúlanum, sum skulu taka ímóti barninum, ella tey kunnu venda sær til Sernám at fáa ráðgeving.

Karmar

Skúlin í Leirvík hevur góðar umstøður at taka ímóti Skúlaspíranum. Skúlaspírin húsast í stovu 14 og 15 og brúkar harumframt stovu 2 og 16 til handaligt/kreativt virksemi og spæl.

Spæliøkið er sera barnavinaligt, fjølbroytt og avbjóðandi, soleiðis at øll børnini kunnu spæla og hugna sær. Spæliøkið verður eisini nógv brúkt av Frítíðarheiminum og í frítíðini, serliga um summarið, tá ið fótbólturin er í hæddini.

Starvsfólk í Skúlaspíranum

Í Skúlaspíranum starvast tveir lærarar og tveir námsfrøðingar. Lærarar eru Tóra á Hólalagnum og Beinta Tórolvsdóttir, og námsfrøðingar Arndis Joensen og Gunnvá Thomsen. Hesi starvsfólk hava nú í fleiri ár tikið sær av forskúlanum.

Kommunan varðar av stuðulsøkinum í Skúlaspíranum og avger, eftir tilmæli frá fakfólki, hvønn stuðul børnini skulu hava, meðan tey ganga í Skúlaspíranum.

Skúlin í Eysturkommunu
Samognarbøur 4, FO-520 Leirvík
Við Gjónna 4, 510 Gøta
Telefon 730060 / 443234
Teldupostur: sey@skulin.fo
Heimasíða: www.skeyk.fo